SOSIALURIN

Prentsmiðjan á Heygsbreyt
tlf. 11820
Tórshavn

Blaðstjórn:
Torfinn Smith (ábyrgd)
Hanna Lisberg

Tað er ikki loyvt at avfotografera lýsingar og myndir úr SOSIALINUM til nýtslu í øðrum bløðum uttan loyvi frá ábyrgdarblaðstj.

Tí velja vit javnaðarmenn!

NÚ gerast skal upp hjá hvørjum einstakum, hvønn hann vel ur komandi týsdag, er avgjørt neyðugt at gera sær greitt hvønn týdning hetta val hevur fyri Føroyar bæði í dag og fyri framtíðina.

TÁ vit mæla veljaranum, um at velja javnaðarflokkin, so er tað tí, at við javnaðarflokkinum kann veljarin avgjørt tryggja sær, at hansara atkvøða fer til ein flokk, sum vil ganga inn fyri at reka aktivan politikk. At reka ein politikk, sum veljarin veit er til frama fyri Føroyar, sum ein politikkur, ið kann merkjast í hvørjum einstakum føroyskum heimi.

HENDA politikk fer ein javnaðarmaður úr Føroyum altíð at reka í Fólkatinginum. Tað er hansara uppgáva at greiða døgnum frá teim veruligu umstøðunum, og tað hevur sanniliga eisini givið úrslit, úrslit sum eingin bert droymdi um kundu henda.

Um marknaðarmál

ÓTRÚLIGT er sum menn kunnu finna uppá at tveita fyri fólki uppundir val. Orðatakið um, at eingin lýgur meira enn helvtina hevur, ið hvussu er undir valfundunum, sum nú fara fram, ikki hildið stikk. Ikki hjá tí eina valevninum Zacharias Wang. Hetta valevnið hevur ferð aftaná ferð slongt um seg við heilum og loddrøttum lygnum.

HART er at taka so hvassliga til, men øðrvísi er tað ikki.

UM javnaðarfloksins støðu til felagsmarknaðarmálið er stutt at siga, at flokkurin týðuliga og greitt longu á heysti 1970 setti støðu sína soleiðis upp:

1. Fiskimarkið verður einans fyri føroyingar.
2. Niðurseturætturin má og skal ikki nýtast til skálkaskjól.

JAVNAÐARFLOKKURIN gongur ongantíð við til at henda støða verður broytt. Hann setir seg hart ímóti at slaka verður her, tí verður fiskimarkið strokið — eru vit foknir.

STØÐAN í hesum álvarsmáli er so týdningarmikil, at her megu vit krevja fulla greiðu.

Ledig forstanderstilling

På grund af den nuværende leders pensionering bliver stillingen som forstander for Færøernes børnehjem, Thorshavn (36 børn) ledig i nær fremtid.

Stillingen ønskes besat med en dygtig og veluddannet pædagog, der har erfaring fra institutionsarbejde for børn, gerne fra en stillling som afdelingsleder eller 1. assistent.

Såfremt den, der ansættes ikke har gennemgået børne- og ungdomsforsorgens fortsættelsesseminarium, kan det blive gjort til et vilkår for ansættelsen, at den nye forstander snarest gennemgår denne uddannelse.

Forstanderstillingen kan eventuelt blive besat ved konstitution.

Stillingen er henført til lønramme 24. Hertil kommer et ulempetillæg på 1.800,- kr. med tillæg som for statens honorarer.

Den samlede årlige begyndelsesløn udgør ca. 63.525 kr.

Ansøgninger, ledsaget af bevis for uddannelse og tid ligere arbejde stiles til

Bestyrelsen for Færøernes Børnehjem, Tórshavn, Færøerne, og indsendes inden den 20. oktober 1971 til bestyrelsens formand.

P. S. SIVERTSEN,
Jónas Broncksgøta 5,
Tórshavn
Færøerne.

Børnø TIL Sosialin

Eingin eigur at sita heima

Fólkatingsvalið 5. oktober er eitt álvarsligt val av tí, at allir flokkar hava stillað upp. Ja eitt sermerkt fólkatingsval, hvar somu flokkar nú hava stillað upp í felag og berjast sum úlvar fyri at vinna sær sess(ir), sum áður hava mett fólkatingssessin fyri einkisverdan. Hetta fólkatingsval verður júst av somu orsøk ikki av minni týdningi enn eitt løgtingsval. Hetta má ein og hvør javnaðarveljari gera sær púra greitt og tí ikki lata líkasælurna ráða valdagin, tí tað kann koma at verða dýrt, og tí møta fjølment við valborðið.

Tað er eisini vert at hava í huga, at allir flokkar vilja manna seg móti javnaðarflokkinum fyri at hann ongan mann skal fáa valdan á danating; hetta hava øll javnaðarfólk skyldu at syrgja fyri ikki kemur at henda, men gera sítt ítasta til tess at fáa fólk at fylkjast um javnaðarflokkin, sum í góðari samvinnu við aðrar góðar kreftur hevur verið førur fyri at skapa eitt samfelag, sum er gott at búgva í fyri tey mongu.

Vert er eisini at hava í huga valúrslitið í Danmark, har javnaðarmaðurin úr Føroyum kann koma at verða avgerandi fyri, at tað vil eydnast at fáa skipað eina sosialistiska stjórn komandi fýra árini, og hava líkaleiðis í huga hvønn týdning tað altíð hevur havt fyri vælferðina í Føroyum.

Tað hava vinnulívsmenn mangan ásannað, at eingin donsk stjórn hevur verið Føroyum so vælsinnað sum ein JAVNAÐARSTJÓRN.

LATIÐ OKKUM HAVA HETTA Í HUGA.

Eitt líknandi úrslit av danska fólkatingsvalinum var í 1960, hvar ein grønlendingur og javn aðarmaðurin úr Føroyum gjørdu tað møguligt at skipast kundi ein sosialistisk stjórn, samstundis sum tað eisini hevði eydnast at fáa eina javnaðarstjórn í Føroyum, og av góðum grundum samarbeiði millum donsku javnaðarstjórnina og føroyska javnaðar-lands stýrið, skaptist STØRSTA FRAMLOPIÐ Í FØROYA SØGU.

HAVI HETTA Í HUGA!

Valevnini hjá sambandsflokkinum royna at billa fólki inn, at sambandsflokkurin er neutralur viðvíkjandi donskum flokspolitikki. Hetta er als ikki so, tí sambandsflokkurin er jú limur av Vinstra flokkinum og hevur altíð styðjað hann til eina hvørja tíð.

Hevur tað kanska ikki hent, at Vinstra fyri at kunna skipa stjórn hevur trongt til stuðul frá onkrum gomlum sambands høvdingi — og hann tók av. Hvør er so góðtrúgvin — at ikki tað sama kann henda aftur — um t. d. ein sambandsmaður skuldi verið loddið á vágskálini — at hann ikki vildi styðja eina borgarliga stjórn fyri at forða eini javnaðarstjórn. — Nei, so góðtrúgvin er eingin! Síðan kunnu sambandsmenn siga tað so ofta teimum lystir.

Javnaðarflokkurin hevur altíð hildið tað verið heilt náttúrligt, at floksins fólkatingsmaður fult og heilt er í samvinnu við sínar partamenn á danatingi. Tí júst í kraft av hesum hevur flokkurin havt møguleika at vera við í teimum nevndum, har føroysk áhugamál verða viðgjørd og hevur sostatt kunnað framført sína hugsan á rætta stað. Javn aðarfloksins fólkatingsumboð hevur eisini í kraft av hesum verið førur fyri at gjørt føroyska fólkinum størri gagn enn nakað annað føroyskt floksumboð á danatingi. Tí velja vit javnaðarmenn 5. oktober!

d—.

Framhald frá 1. síðu. (1)

EEC, men at hann til fólkatingsvalið ætlar at vinna sær mann við hjálp av EEC mótstøðumonnum, sum t. d. undirritaða. Onki er meira skeivt enn, at partur mín í fólkatingsvalinum skal verða at fáa fólk at gera nakað uppá skeivar fyritreytir.

Tað er onki dulsmál, at javnaðarflokkurin eins og aðrir flokkar og fólkið sum heild, ikki er av somu áskoðan um framferðina í EEC-málinum. Floksins støða til EEC er ikki avgjørd enn, men verður tað væntandi á landsfundi í vetur.

Eg havi ikki lagt royk yvir støðu mína til EEC. Eg meti eina EEC-innliman at verða størstu vanlukku, ið henda kann landi okkara. Innliman í EEC er at breiða lak á allar tær hugsjónir, ið hildið hava uppi, ment og styrkt og støðugt borið fram tjóð okkara. Søgan og komandi ættarlið vilja við góðum rætti seta okkum undir ákæru, um vit ikki nú, meðan møguleiki er til tess, leggja alla orku í fyri at byggja borð fyri EEC.

Tí átti 14. september, ella tann óhepna hondin har verið hevur, tikið við læru av starvsfeløgum sínum, teimum sum stjórna uttanríkispolitikkinum í bladnum, og lagt sær væl í geyma hvussu hesir viðgera eina søk, erliga og reiðiliga og við meining í.

Tann ego-politiska tørvin verður altíð høvi til at røkta seinni.

So í stríðnum móti EEC ber væl til at halda uttanfyri alla leflan og spælan við primitivum argumentum, vend til tað fordómsfullu politisku tankagongdina.

Var tað bert EEC, sum henda óhepna hond stríddist ímóti, vildi neyvan nakað verið til hindurs fyri, at hon fr[illegible] yvir, at javnaðarmenn ei[illegible] ímóti EEC. Men [illegible] skal misnýtast, [illegible] amboð og ikki til n

Arvid Skoubo.

Noregs-nýtt v. Fridtjof Diesen

Kommunevalget er over

og Arbeiderpartiet, Høyre, Venstre og SF har hatt tilbakegang. Kristelig folkeparti, Senterpartiet og kommunistene hadde framgang. Arbeiderflertallet i Oslo er reddet, men Stavanger og Bergen gikk tapt. Man regner med at det var 23 pst. av de norske velgerne som satt heime og utgjorde et stort parti. Men skal vi tenke framover så møtes vi igjen i 1973 for å gi arbeiderregjeringen flertall i stortinget.

Så kom det en prinsesse

og våre politikkere må forandre grunnloven for at hun skal få arverett til tronen. Den lykkelige far ga målene 50 cm, mørk og vekten var 3590 gr. Og den lykkelige bestefar kom direkte heim fra New York og var oppom for å hilse på og sammenkalle regjeringen i anledningen. Flaggene heises overalt 21 skudd fra festningen og navn og dåp skal bestemmes. Dagen ble den 22. september og en ny dato blir ført inn i kongehusets saga. — Je, så får ukepressen noe mere å skrive om.

De danske valgene

kom midt opp i det hele og vi fikk en bra dekning av det også. Så håper vi at Føroyar gir Folketinget sosialdemokrater som trenges for regjeringen Krag. Det var en spennende valg. Forrige gang i 1966 var vi i Askov og fulgte valget direkte i Sjonvarpen.

Føðingardagar. Í gjár fylti Jógvan við Ánna, yvirlærari, Tórshavn 65 ár.

Í morgin verður Grækaris Madsen, Kvívík, 91 ár.

Stjórnin fyri
»Hvør fjøl á flot«
takkar her øllum, bæði teimum, ið fóru á flot, og teimum, sum spjaddu hugna í Vágsbotni um kvøldið, fyri ta góðu undirtøku, hetta tiltak fekk.

FÆRØSK MARGARINE
Vita No 1
VITAMINISERET
FÆRØSKT PRODUKT FINT PRODUKT